## Røkke lænir 400 mió kr. til krillverkætlan

Aker BioMarine, ið er eitt av feløgunum hjá kenda norska vinnulívsmanninum, Kjeld Inge Røkke, lænir 400 milliónir krónur til sína krill-verkætlan í Suðuríshavinum. - Hetta kemur at geva felagnum fíggjarliga styrki til at koma inn á altjóða vakstrarmarknaðir og til menning av felagnum, sigur Helg Midttun, stjóri í Aker BioMarine í eini fráboðan. Felagið hevur ætlanir um at gerast ein av heimsins fremstu framleiðarum av heilsuvørum burtur úr krill, ið verður fiskað í Suðuríshavinum við nýmótans skipum, m. a. einum umbygdum Atlantic Navigator, ið áður hevur veitt frá Føroyum.

*Business-Line*



# Alivinnan er væl fyri og

**- Karmarnir um alivinnuna eru yvirhøvur góðir, og vinnan hevur seinasta árið víst nøkur góð úrslit, bæði tá ræður um vøkstur, felli og sjúkutilburðir, sum eingin hevur verið, sigur Føroya Havbúnaðarfelag, sum júst hevur havt aðalfund**

ALING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroya Havbúnaðarfelag hevði aðalfund í seinasta fríggjadag, har eitt nú ársfrágreiðing felagsins fyri farna ár varð løgd fram.

Í frágreiðingini vísir nevndin á, at føroyska framleiðslan av laksi og sílum fall nógv árini 2003- 2006.

- Tá framleiðslan var størst, var hon 56.000 tons, og tá hon var minst, var hon einans 18.000 tons (2006). Í 2007 vaks framleiðslan aftur, og samlaða tøkan var stívliga 30.000 tons.

Havbúnaðarfelagið sigur, at framleiðslan í 2008 helst verður eini 40.000 tons.

### Góðir karmar

- Karmarnir um alivinnuna eru yvirhøvur góðir, og vinnan hevur seinasta árið víst nøkur góð úrslit, bæði tá ræður um vøkstur, felli og sjúkutilburðir, sum eingin hevur verið.

Felagið vísir á, at saman við sera góðum marknaðarprísi hevur hetta gjørt, at alivinnan hevur havt hampuliga góð úrslit í 2006 og 2007.

- Væntandi er, at útboðið av laksi á marknaðinum í Evropa í 2008 eins í 2007 fer at økjast. Hetta fer óivað at trýsta marknaðarprísin. Alisøgan sigur okkum, at prísurin sveiggjar sera nógv, men um føroyska vinnan megnar at hava ein burðardyggan rakstur og fyribyrgja sjúku, skuldi alivinnan klára at liva við teimum príssveiggjum, sum fara koma, heldur Havbúnaðarfelagið.

### Útseting av smolti

Í ársfrágreiðingini verður víst á, at 9 miljónir fiskar vóru settir út í 2007, og roknað verður við, at millum 9 og 10 miljónir fiskar verða settir út í 2008. Í 2009 verður roknað við, at talið fyri útseting verður heldur hægri, helst millum 10 og 11 miljónir fiskar.

- Vøksturin í framleiðsluni komandi árini fer at geva vinnuni avbjóðingar, men nevndin í felagnum er sannførd um, at vinnan í størri mun enn fyrr er før fyri at taka hesar avbjóðingar.

### Lóggávan endurskoðast

Føroya Havbúnaðarfelag vísir á, at týdningarmestu málini, sum nevndin hevur arbeitt við í 2006, er eitt nú luttøka í arbeiðsbólki, sum endurskoðar alilóggávuna.

- Arbeiðið varð ikki liðugt undan løgtingsvalinum, og felagið hevur ikki fingið ábendingar, um hetta arbeiðið heldur fram, nú nýggj samgonga er skipað.

Víst verður á, at kunngerðin um fyribyrgjandi rakstur framvegis er undir endurskoðan.

- Vit hava havt hesa kunngerð til hoyringar nakrar ferðir, og felagið roknar við, at kunngerðin kemur aftur til hoyringar í næstum.

Felagið sigur, at rakstrarkunngerðin ásetir, at alivinnan skal rapporterað inn til myndugleikarnar elektroniskt.

- Hetta krav hevur havt við sær, at Havbúnaðarfelagið heitti á Maritec um at gera eitt dátuútflytingarmodul til »farm conrol«, soleiðis at nú ber til hjá vinnuni at senda hesar upplýsingar beinleiðis frá fram leiðsluskrásetingarskipanin i, sigur felagið.



*- Alivinnan byggir á góðar karmar og nærlagni, og í dag er alivinnan burðardygg, sigur Havbúnaðarfelagið*



*Ragnar Joensen er formaður í Føroya Havbúnaðarfelag*

### Rognaveitarar

Í 2007 setti Havbúnaðarfelagið í verk eina kanning av rognaveitarum í Noregi, Íslandi og Skotlandi.

- Vit meta, at eitt tað veikasta liðið í føroysku sjúkutilbúgvingini eru rognini. Rogn verða innflutt, og eingi serlig krøv verða sett, tá ræður um sjúku.

Havbúnaðarfelagið ber nevniliga ótta fyri, at sjúka kann verða innflutt til Føroya við rognum. Stórir trupulleikar eru við eitt nú PD og HSMB í grannalondunum.

- Vit vilja ikki hava hesar sjúkur hendavegin. Arbeiðsbólkurin, sum kannaði hetta, hevur latið Havbúnaðarfelagnum eina frágreiðing um sjúkustatus og genetiska støði á rognum úr grannalondunum, sigur felagið.

### Starvsfólk í vinnu

Í februar í fjør skipaði Havbúnaðarfelagið fyri ein-